Bretska stjórnin og oljufeløg hond í hond:

# Týðandi vegamót á Atlants

**Nú bretska stjórnin og oljufeløg skulu til at seta út í kortið eina framtíðar útbyggingarætlan vestan fyri Hetland til ein samlaðan kostnað uppá góðar 40 milliardir krónur í nýtt infrakervi til funnin men enn ótroytt gassfelt í økinum og til at útbyggja tey, verður ivi sáddur um lønsemið. Við verandi kostnaðarstøði og gassprísum kann vera ivasamt um ein slík útbygging loysir seg. Tí royna feløgini at fáa myndugleikarnar at lækka kolvetnisskattin, skulu tey gera so stórar íløgur**

GASSÚTBYGGING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*







*Vit síggja økið vestan fyri Hetland og báðumegin miðlinjumarkið millum Føroyar og Hetland. Fyri sunnan hava vit verandi oljukeldur Foinaven og Schiehallion og Clair, sum eru tær einastu, ið framleiða olju. Ì grannalagnum fyri norðan finna vit nógvar smærri gasskeldur. Tað eru hesar, sum oljufeløg og myndugleikar tosa um at búna tvs. Byggja út til framleiðslu og skulu tær vera lønandi er neyðugt infrakervi tvs. Gassleiðing og framleiðslustøðum, sum bindar allar hesar gasskeldunar saman. Longu fyri norðan og vestan móti føroyska markinum eru so aðrar keldur so sum Rosebank og Cambo, ið eisini kunnu fáa tørv á at binda í gassleiðing*

Verkætlanarflaggskipið hjá bretsku stjórnini at útbyggja og menna verandi orkukeldur vestan fyri Hetland hevur fingið eitt skot fyri bógvin, orsakað av hækkandi útreiðslum, høgum skatti og lágum gassprísum ljóðar frá keldum í oljuvinnuni. Verður ikki av álvara sett fokus á, hvussu man skal loysa hesar spurningar, so fara olju- og gassgoymslurnar vestan fyri Hetland, sum eru mettar at vera ein sættipartur av øllum kolvetnisgoymslunum hjá Stórabretlandi, at vera verandi í undirgrundini. Samstundis sum olju- og gassframleiðslan í Norðsjónum er komin í hæddina kann henda sannroynd fáa álvarsligar avleiðingar fyri orkutrygdina hjá Bretlandi og restini av Europa.

### Heft at ótryggum økjum

Í 2006 framleiddi Bretland 77.4 milliardir kubikmetrar av gassi, sum svarar til 16% av samlaðu nýtsluni í EU. Men framleiðsla frá verandi keldum minkar heilt skjótt. Bretland kann gerast 80% heft at innfluttum gassi í 2020, sum kann stava frá ótryggum økjum við politiskum trupulleikum og váða segði bretski ráðharrin fyri Handil og Ídnað, Alistair Darling á einum stórari olju og gassráðstevnu í Skotlandi nú um dagarnar. –Vit hava tørv á at fáa sum mest burtur úr okkara tilfeingi, sum framvegis er í Norðsjónum segði ráðharrin. Hann vísti síðani á økið vestan fyri Hetland, sum hevur stórt virði og goymir olju og gass sum svarar til kanska millum 3 til 4 milliardir tunnur ella 17% av goymslunum, sum eru eftir. Fundini, sum longu eru gjørd vestan fyri Hetland, goyma fyrst og fremst gass. Um alt hetta gassið kom á marknaðin í 2010 og 2011, so kunnu vit í 2014 nøkta 6% av gasstørvinum í Bretlandi frá keldunum vestan fyri Hetland sigur David Mendelson, forrætnings- og menningarstjóri hjá oljurisanum Total við Dave Jones tíðindafyritøkuna. Franska oljufelagið Total eigur Laggan, sum er størsta gasskeldan, ið higartil er funnin vestan fyri Hetland. Hon varð longu funnin fyri mongum árum síðani, men hevur higartil verið mett ov lítil til at kunna bera eini einsamallari gassframleiðslu og infrastrukturi á Atlantsmótinum.

Millum feløgini, sum annars hava rættindi til tilfeingið vestan fyri Hetlandi eru m.a. BP, Chevron, ExxonMobil, Dong og Total. Onnur eru Statoil, OMV, Amerada Hess og Shell. Nógvar olju- og gasskeldur vóru funnar fyri meira enn 20 árum síðani, men fjarstøðan og avbjóðandi umstøðurnar har hava higartil forðað fyri eini útbygging av gassfeltum. BP byrjaði framleiðslu frá Foinaven oljukelduni miðskeiðis í 90 árunum og frá Schiehallion kelduni í 1998 og frá Clair í 2005. Hesar oljukeldur eru mettar at goyma millum 600 til 700 milliónir tunnur av olju. Tær umleið fýra milliardir kubikkføtur av gassi eru framvegis órørdar í sínum goymslum.

- Harðir vindar, høgar aldur gera tað sera torført at seta upp útbúnað til at fáa fjalda gassið upp úr undirgrundini sigur Peter Mendelson frá Total. Bara tað at bora brunnar har úti er torført. Flestu av keldunum eru á 400 til 1000 metra dýpi, nógv djúpri enn verandi oljukeldur í Norðsjónum. Størsta avbjóðingin er tann, at eingin infrastruktur, undirstøðukervi er í økinum. Nýggjar gassútbyggingar miðskeiðis og í syðra parti av Norðsjónum kunnu binda í verandi pallar og rørleiðingar. Vestan fyri Hetland skal alt hetta byggjast upp frá ongum.

Út frá tí sannroynd at flestu av keldunum vestan fyri Hetland eru av meðalstødd, er tað ein spurningur, um tað er lønandi at byggja nýggjan infrastruktur, sum kann vera grundarlag undir eini útbyggingarætlan.

### Útbygging fyri 40 mia. kr.

Oljufeløg, sum arbeiða í økinum, hava saman við DTI, sum er bretska handil og ídnaðarmálaráðið, ið eisini umsitur orkumál, skipað ein arbeiðsbólk í fjør fyri at menna eina partnaraloysn fyri útbygging av infrastrukturinum vestan fyri Hetland. Hesin bólkur fer at geva bretsku stjórnini eina fyribils frágreiðing í mai.

Fyribils útrokningar hjá stjórnini fyri 30 framleiðslubrunnar, umleið 800 kilometrar av nýggjum gassleiðingum og ein gassframleiðslustøð á landi ella til havs, vísa, at hetta er mett til at kosta í minsta lagi 4 milliardir pund ella góðar 40 milliardir kr. Men tøkniligu avbjóðingarnar saman við høgum skatti, hækkandi kostnaði og verandi lágum gassprísum kunnu koma uppá tvørs av ella undirminera eina avgerð hjá arbeiðsbólkinum um at mæla oljufeløgum og myndugleikum til at fara undir stóru verkætlanina.

- Fólkini mugu veruliga til at leggja høvur í blot, tí so stór óvissa er knýtt at gassprísunum næstu fýra til fimm árini sigur Mike Tholen, búskaparstjóri hjá UK Offshore Operators' Association, UKOOA. Gassflutningur gjøgnum nýggjar leiðingar og nýggir LNG terminalar (LNG er gass í flótandi formi. Man hevur so terminalar til at ”likvificera” tvs. gera flótandi, blaðm.) hava gjørt, at gassprísurin í Bretlandi er farin niður í eina helvt síðani veturin 2006, til 18 dollarar per samsvarandi tunnu av olju.

Flestu serfrøðingar í oljuvinnuni siga, at skal tað løna seg at fara eftir olju og gassi, sum liggur í undirgrundini, so má prísurin vera umleið 22 til 25 dollarar fyri tunnuna. Oljuprísurin, sum í løtuni er 60 dollarar fyri tunnuna, hevur lítlan búskaparligan týdning í einum øki, sum er ríkt uppá gass heldur enn olju siga serfrøðingar. Kostnaðurin fyri at fáa og taka orkutilfeingi upp er nógv vaksin. Olju- og gassídnaðurin hevur nógv brúk fyri útgerð og útbúnaðari arbeiðsmegi. Leigan fyri boripallar í Norðsjónum er økt við 600% tey seinastu trý árini, og annar kostnaður veksur eins skjótt.

- Teir sera høgu tænastukostnaðirnir og teir lágu gassprísirnir, saman við spurninginum um støddina, ger roknistykkið fyri eitt nú Laggan verkætlanina til eina stóra avbjóðing segði Mendelson á oljuráðstevnuni í Skotlandi. Framtíðar vánirnar eru ikki bara ljósar. Geoff Gillies, ein av serfrøðingunum hjá ráðgevarafyritøkuni Wood Mackenzie